# Olli Rehn við spurningum

ES-kommiserurin Olli Rehn, sum hevur umsóknir um limaskap í samveldinum sum málsøki, kom í gjár til Reykjavíkar. Við sær hevði hann umleið 2.500 spurningar, sum hava týdning í sambandi við íslendsku umsóknina um limaskap. Morgunblaðið skrivar, at íslendska stjórnin skal svara spurningunum sum skjótast og í seinasta lagi tann 16. november, um umsóknin um limaskap skal koma fyri á fundi, sum verður í desember. Íslendingar ásanna, at spurningarnir eru nógvir, men ugga seg við, at teir eru færri enn teir, sum Montenegro hevur fingið.






*Arbeiðsfólkið hjá Tavuni búði á hotelli í týska býnum Rüdesheim, sum liggur við Rhínánna og beint vestanfyri Frankfurt*

- Jú, tað hevur gingið væl at varðveitt fólkið. Vit hava havt eina støðuga stammu, og síðan eru tað altíð tey, sum koma og fara. Soleiðis eigur tað eisini at vera.

Jóan Magnus Rasmussen vísir á, at nú er tað meira vanligt, at fólk ringja og spyrja um arbeiði, men í løtuni er verri at sleppa framat.

- Flestu fólkini, sum arbeiða á Tavuni, eru úr Leirvík og bygdunum nærindis, og onkur er úr Klaksvík, sigur hann.

## Góð ársinntøka

Spurdur, hvussu høg ein ársinntøka hjá einum arbeiðsfólki á Tavuni er, tá árið er runnið, væntar stjórin, at hendan liggur millum 200.000 og 250.000 krónur – alt eftir, hvussu dúgliga fólk hava hingið í.

- Fólk fingu frí einar tríggjar dagar, áðrenn vit fóru til Týsklands, og í næstu viku er longu ætlanin at byrja við upsanum, sigur Jóan Magnus Rasmussen.



*Her sigla tey eftir Rhínánni, sum liggur beint við býin Rüdesheim, har ferðalagið búði á hotelli*